**Bjørn Kalsø**
**Jørgen Niclasen**
**Jógvan Skorheim**
**Jákup Mikkelsen**
**løgtingsmenn**

**Broytingaruppskot**
**til**
**3. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 18/2017: Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 12, stk. 1 verður sum 2. pkt. sett: "Føroyskir opnir træbátar kunnu, hóast 1. pkt., fiska frítt uttan fiskiloyvi."

**Viðmerkingar**

Við hesum verður loyvt føroyskum opnum træbátum at fiska uttan fiskiloyvi bæði til húsbrúk og vinnuligt. Treytin sambært § 40, stk. 1 um, at tað ikki er loyvt at avreiða ella á annan hátt selja veiðu til húsbrúk, er ikki umfatað av hesi áseting.

Allýsingin av opnum føroyskum træbáti er tann sama í hesi lógini, sum í MVG – lógini, har bátasmíð er undantikið meirvirðisgjaldi.

**Á Løgtingi, 12. desember 2017**

| | |
|---|---|
| Bjørn Kalsø | Jørgen Niclasen |
| Jógvan Skorheim | Jákup Mikkelsen |